UTTAN ÚR HEIMI

Stúra fyri oljuni

Nú er staðfest, at olja rennur úr tí sokna tangaskipinum, og nú eru portugisar eisini farnir at stúra fyri oljunni

OLJUDÁLKING
Árni Joensen



Mynd, sum franski kavbáturin "Nautile" tók av tí sokna "Prestige". Myndirnar staðfesta, at olja rennur úr skipinum og upp í sjógvin

Mynd: Reuters

Sponsku myndugleikarnir váttaðu í gjár, at olja rennur framvegis úr tangunum á tí sokna skipinum "Prestige". Spaniumenn hava annars tvíhildið um, at skipið lak ikki, men í gjár váttaði Mariano Rajoy, varaforsætisráðharri, at olja rennur úr skipinum.

Myndir, sum franski kavbáturin "Nautile" hevur tikið av skipinum, vísa, at olja rennur úr einum tanga í tí fremra partinum av skipinum, men sambært Mariano Rajoy er talan um fleiri lekar.

Portugisisku myndugleikarnir hava fleiri ferðir sagt, at olja er runnin úr "Prestige", síðani tað brotnaði av um tvøran og sakk tann 19. november, og nú spaniumenn hava váttað illgrunan, eru portugisar av álvara farnir at stúra. Fram við strondini har norðuri í Portugal eru nógvar smáar fiskivinnubygdir, og fiskimenninir bera nú ótta fyri, at teirra lívsgrundarlag fer fyri bakka.

Portugisiski umhvørvismálaráðharrin, Isaltino Morais, var fyrradagin við einum flogfari á leiðini, har "Prestige" sakk. Aftan á flogferðina segði hann, at nakað av olju var at síggja, og at sumt var longu komið inn ímóti landi.

Hildið verður, at millum 10.000 og 20.000 tons eru runnin úr tangunum á "Prestige", sum hevði 77.000 tons í lastini, tá tað sakk 115 fjórðingar úr sponsku útnyrðingsstrondini. Higartil hevur ættin forðað fyri, at oljan er rikin ímóti portugisisku strondini, men nú tað er staðfest, at meiri olja rennur úr skipinum, stúra portugisar fyri, hvat kann henda.

Aftur ein friðarsáttmáli úr Oslo

Eftir borgarakríggj í 19 ár eru myndugleikarnir í Sri Lanka og teir tamilsku tikararnir vorðnir samdir um at binda frið

SRI LANKA
Árni Joensen

Oslo tykist vera eitt gott val, tá talan er um fundarstað fyri at fáa stríðandi partar at semjast.

Seinastu dagarnar hava umboð fyri myndugleikarnar í Sri Lanka og teir tamilsku tikararnar sitið við samráðingarborðið í norska høvuðsstaðnum fyri at royna at fáa enda á tí 19 ára langa borgarakrígnum. Fyrradagin kunngjørdi samráðingarleiðararnir hjá báðum pørtum, at teir vóru vorðnir samdir um ein sáttmála.

Teir tamilsku tikararnir hava seinastu 19 árini stríðst fyri at fáa sjálvsstýri í norðara partinum av landinum, og tað fáa teir nú. Sri Lanka verður kortini verandi eitt ríki, men tamilarnir har norðuri fáa avgerðarrætt í nógvum viðurskiftum.

Semjan ber í sær, at Sri Lanka skal hava eina nýggja grundlóg, og tað arbeiðið byrjar nú. Partarnir hava avtalað at halda fram við samráðingunum í Thailandi í januar og seinni aftur í Japan.

Bæði stjórnin í Colombo og tamilarnir róstu fyrradagin altjóða semingsroyndunum, sum hava verið undir norskari leiðslu. Í februar eydnaðist tað at fáa partarnar at semjast um vápnahvíld, og báðir samráðingarleiðararnir vóru fyrradagin á einum máli um, at nú verður friður í Sri Lanka.

United Airlines nær húsagangi

Næststørsta flogfelagið í USA er í svárari kreppu, men politikararnir vilja ikki hjálpa tí

FLOGFERÐSLA
Árni Joensen

United Airlines, sum er næststørsta flogfelagið í USA, skal hava næstan tvær milliardir dollarar fyri at sleppa undan húsagangi. Felagið bað stjórnina í Washington veðhalda fyri 1,8 milliard dollarum í láni, men stjórnarnevndin, sum hevur ábygrdina av flogferðsluni, sýtti fyri at ganga umsóknini á møti. Ein limur atkvøddi fyri, men tveir atkvøddu ímóti. Grundgevingin var, at metingarnar hjá flogfelagnum eru ikki nóg álítandi, og at tað tí er ov stórur vandi fyri, at rokningin endar hjá skattgjaldarunum.

Eins og hini amerikansku flogfeløgini hevur Unites Airlines verið fyri stórari afturgongd síðani tann 11. september í fjør. Í síðstu viku eydnaðist tað felagnum at fáa starvsfólkini at góðtaka, at lønin verður lækkað, men tað er ikki nóg mikið til at bjarga felagnum. Felagið fer væntandi at biðja um verju ímóti kreditorunum, soleiðis sum amerikanska lógin heimilar, meðan leitað verður eftir øðrum loysnum.

Berlusconi má kannast

Ein eysturríkskur ES-tingmaður krevur nú, at samstarvsfelagsskapurin hjá ES, EPP, skal kanna tíðindini um, at italski forsætisráðharrin, Silvio Berlusconi, hevur havt samband við italsku mafiuna.

Ein mafialeiðari avdúkaði undir avhoyringum í einum rætti mikudagin, at mafian hevur havt samband við flokkin hjá Berlusconi, Forza Italia, síðani 1993, og at mafian m. a. hevur hjálpt fleiri valevnum hjá flokkinum. Afturfyri fingu fongsloðir mafialimir betri sømdir í fongslunum, og tað almenna gavst eisini við at leggja hald á fastar ognir hjá mafiuni, segði mafialeiðarin.

Eysturríkski ES-tinglimurin Hennes Swoboda, sum er sosialdemokratur, sigur, at hesi viðurskifti eru so álvarssom, at tey mugu kannast.

1 mia. í restskatti

Ein 28 ára gamal svii, Robert Tingvall, hevur sett nýtt svenskt met, tá tað snýr seg um restskatt.

Tann 28 ára gamli maðurin býr heima hjá mammuni stutt uttan fyri Stockholm, men sambært blaðnum Dagens Industri eigur hann sjálvur einar 20 milliónir krónur. Hann hevur í fleiri ár roynt seg sum partabrævahandilsmaður, og í fjør keypti og seld hann partabrøv fyri tilsamans 9,8 milliardir svenskar krónur. At hann var so virkin gjørdi, at hann fekk ikki stundir til at fylla sjálvuppgávuna út.

Líkningarmyndugleikarnir mettu tí um inntøku og skatt hansara, og teir komu eftir, at Robert Tingvall skal gjalda eina milliard krónur restskatti. Sjálvur sigur hann, at talan er um eina misskiljing, sum hann væntar at fáa rættaða. Tað fær hann kanska eisini. Í 2000 varð hann álíknaður at gjalda 299 milliónir krónur í skatti, men tá avtornaði, skuldi hann bert rinda 900.000 krónur.

Bigfoot deyður

Í 1958 vóru amerikanarar á gosi, tá tað frættist, at ein løgin skapningur var sæddur har norðuri í statinum Kalifornia. Tann ókendi skapningurin minti um eina apu, men var væl størri og hevði sjáldsama stórar føtur. Tíðindini høvdu við sær, at nógvir amerikanarar leitaðu sær til Kalifornia, og myndamenn lógu upp á lúr í langa tíð fyri at fáa eina mynd av hesum sjáldsama skapninginum.

Men hetta var bara skemt, tí skapningurin æt Ray Wallace. Hann var byggimeistari í Kalifornia, og ein dagin fann hann uppá at lata seg í ein stóran lodnan búna og stórar træføtur, sum hann hevði evnað til. Tá onkur so kom fram á sporini, fór tað sum eldur um landið. Øll vildu sígja Bigfoot.

Men nú er Bigfoot deyður. Ray Wallace doyði tann 16. november. Hann var 84 ára gamal.

Gary Glitter rýmdur

Kenda poppstjørnan Gary Glitter, sum í 1999 fekk fýra mánaða treytaleysa fongsulsrevsing fyri at hava tíkið barnapornografiskt tilfar niður á alnótini, fjalir seg eftir øllum at døma í Kambodja.

Bretsku myndugleikarnir vilja hava fatur á honum, og nú hava kambodisku myndugleikarnir gjørt av at fara at leita eftir honum. Í Phom Penh verður váttað, at Gary Glitter, hvørs veruliga navn er Paul Francis Gadd, kom til Kambodja fyri átta døgum síðani, og at hann eftir øllum at døma er onkunstaðni í høvuðsstaðnum Phom Penh. Hildið verður, at hann kom til Kambodja úr Vietnam.

Gary Glitter er ikki tann fyrsti, sum er dømdur fyri kynsligan ólevnað, og sum er rýmdur til Kambodja, men myndugleikarnir har vilja ikki longur hava sitandi á sær, at landið verður roknað sum trygt stað hjá slíkum. Tí skal Gary Glitter finnast, siga teir.